

# Samskipari til fiskiflotan

**Starvsøki umfatar:**
- Ábyrgd og samskipan av øllum manningar- og lønarviðurskiftum umborð á fiskiskipunum hjá reiðarínum
- Dagligt samskifti við manningarumboð og skiparar á fiskiskipunum

**Útbúgving:**
- Fyrimunur er um tú hevur navigatør- ella maskinmeistaraútbúgving, men ikki nøkur fortreyt fyri at søkja

**Royndir:**
- Skal hava royndir við fiskiskipum
- Kunnleiki til ISM/ISP er ein fyrimunur, men ikki ein fortreyt
- Arbeitt við fólki úr øðrum londum
- Arbeitt við logistikki

**Førleikar:**
- Lærunemm/ur
- Góð samskiftis- og samstarvsevnir
- Taka neyðugar avgerðir
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Eyga fyri detaljum
- Dugir at orða teg í talu og skrift á føroyskum og enskum (fyrimunur er eisini at kenna til onnur mál sum spanskt og russiskt)
- Góðan teldufórleika

Løn sambart avtalu.

Umsóknarfreistin er 15. oktober 2010

Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum, kunnu sendast við telduposti til justin@thor.fo ella sum vanligt bræv, til:

**Pf. Thor**
Att.: Justin Philbrow
Bryggjan 5
FO-420 Hósvík

Nærri fæst at vita við at ringja til Justin Philbrow, manningarleiðara ella Gunnbjørn Joensen, stjóra, á tel 422 503, ella á heimasíðuni www.thor.fo

FO-420 Hósvík · Faroe Islands · Tel 422 503
Fax 422 383 · thor@thor.fo · www.thor.fo

THOR

*P/F THOR, er eitt felag sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni, og annað virksemi í hesum sambandi, víst verður til heimasíðu okkara www.thor.fo*

# JAVNSTØÐU-NEVNDIN Í EYSTUROYNNI

**MIKUKVØLDIÐ 6. OKTOBER KL. 19.30 SKIPAR JAVNSTØÐUNEVNDIN FYRI ALMENNUM TILTAKI Í LOSJUNI GLOTTI VIÐ GØTUGJÓGV.**

**SKRÁ:**

**ARBEIÐSLÍV, HÚSARHALD OG JAVNSTØÐA**
*Karin Jóhanna L. Knudsen, granskari, Granskingardepilin fyri Økismenning*

**FORTÍÐARINNAR HETJUR Í ANDRÓÐRI – MASKULINITETUR OG SAMLEIKI HJÁ UNGUM MONNUM Í FØROYUM**
*Firouz Gaini, granskari og lektari á Fróðskaparsetri Føroya*

***Tiltakið er alment og ókeypis.***

Javnstøðunevndin

TLF. 21 28 48 | JAVNRATT@JAVNRATT.FO | WWW.JAVNRATT.FO




Boðað verður við hesum til eykaaðalfundar í Eik Banka P/F **hósdagin 7. oktober 2010, kl. 18.00** á Hotel Føroyum, Tórshavn.

Aðalfundurin verður innkallaður í framhaldi av, at Eik Banki P/F hevur gjørt eina treytaða avhendingaravtalu við Finansiel Stabilitet (Fíggjarligt Støðufesti). Innkallingin er gjørd sambært ásetingini í "lov om finansiel virksomhed" § 246, stk. 1, við fylgjandi:

**Dagsskrá**

1. Kunning frá nevndini um viðurskifti bankans, og serstakliga um, at bankin ikki lýkur tað av Fíggjareftirlitinum álagda solvenskravið, og kunning um ta treytaðu avtaluna, ið er gjørd millum bankan og Finansiel Stabilitet A/S, um avhending av virksemi bankans (undantikið partapening og afturumsettan kapital, sbr. § 132 og § 136 í "lov om finansiel virksomhed") til eitt av Finansiel Stabilitet stovnað dótturfelag.

2. Viðgerð av og avgerð um møguliga innkomin uppskot frá partaeigarum bankans ella umboðsráðslimum um onnur tiltøk, ið vilja hava við sær, at bankin lýkur solvenskravið í "lov om finansiel virksomhed" § 124, ella um avtøku á treytum, sum Fíggjareftirlitið kann góðkenna, sbr. "lov om finansiel stabilitet" § 7, stk. 4, og "lov om finansiel virksomhed" § 246, stk. 2.

**Viðtøkukrøv**
Kunningin undir pkt. 1 á dagsskránni skal ikki samtykkjast.

Um onnur uppskot til samtyktar koma á aðalfundinum um tiltøk sambært pkt. 2 í dagsskránni, ið vilja hava við sær, at bankin lýkur solvenskravið, krevst, at í minsta lagi 2/3 av tí umboðaða partapeninginum atkvøða fyri, uttan so at helvtin av partapeningi bankans er umboðaður á aðalfundinum, í so føri kann avgerð um tiltøk takast við vanligum meiriluta, sbr. "lov om finansiel stabilitet § 7, stk. 4, sbr. "lov om finansiel virksomhed" § 246, stk. 5. Um tílík onnur uppskot, sum Fíggjareftirlitið kann góðkenna, verða samtykt, verður avtalan við Finansiel Stabilitet A/S, sbr. "lov om finansiel virksomhed" § 246, stk. 2, sett úr gildi. Um onnur uppskot verða samtykt, vil avtalan við Finansiel Stabilitet verða verandi bindandi.

**Uppskot frá partaeigarum og umboðsráðslimum**
Uttan mun til § 12 í viðtøkunum skulu møgulig uppskot frá partaeigarum ella umboðsráðslimum um tiltøk, ið vilja hava við sær, at bankin lýkur solvenskravið í "lov om finansiel virksomhed" § 124, ella um avtøku, sbr. pkt. 2 í dagsskránni, verða innlatin til nevndina við at handa tey á høvuðsskrivstovu bankans í seinasta lagi mikudag tann 6. oktober 2010, kl. 18.00 sbr. "lov om finansiel stabilitet" § 7, stk. 4, sbr. "lov om finansiel virksomhed" § 246, stk. 6.

**Dagsskrá og fullfíggjað uppskot**
Dagsskráin, tann treytaða avtalan og tey fullfíggjaðu uppskotini fara at liggja frammi á høvuðsskrivstovu bankans, Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn, at hyggja ígjøgnum hjá partaeigaranum í seinasta lagi 24 tímar undan aðalfundinum, sbr. "lov om finansiel stabilitet" § 7, stk.4, sbr. "lov om finansiel virksomhed" § 246, stk. 4.

**Partapeningur og atkvøðurættur**
Partapeningur felagsins er kr. 812.927.400, lutaður sundur í 8.129.274 partabrøv.

Umboðsráðið útinnir atkvøðurættin hjá partaeigarunum á aðalfundinum.

Partaeigarar hava við at vísa atgongdarkort atgongd til aðalfundin, har teir hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.

**Bílegging av atgongdarkortum**
Atgongdarkort verða útflýggjað teimum partaeigarum, sum hava bílagt umvegis heimasíðu okkara www.eik.fo ella biðið stjórnarskrivstovu bankans um hetta umvegis teldupost til: office@eik.fo ella á telefon 348571 og 348565 í seinasta lagi hálvan tíma áðrenn fundin. Eftir hetta verða atgongdarkort ikki útflýggjað.

Gevið gætur: Atgongdarkort verða ikki send við postinum, men kunnu heintast á høvuðsskrivstovu bankans Yviri við Strond 2, Tórshavn.

**Kontoførandi peningastovnur**
Eik Banki P/F er partabrævaútgevandi peningastovnur í sambandi við partabrøv felagsins. Partaeigarar kunnu sostatt útinna síni fíggjarligu rættindi við at venda sær til Eik Banka P/F ella egnan kontuførandi peningastovn.

Tórshavn, tann 3. oktober 2010

Eik Banki P/F
Nevndarinnar vegna

Odd A. Bjellvåg
nevndarformaður

www.eik.fo